VINNU SÍÐURNAR
VINNA HANDVERK HANDIL
Nr. 27 • týsdagur • 7. februar 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

## Jákup keypir fyri 600 mió kr.

Jákup á Dul Jacobsen hevur enn einaferð verið úti um seg á amerikanska partabrævamarknaðinum.

Íslendska Morgunblaðið skrivar í dag, at Jákup nú hevur keypt ein ognarpart áljóðandi 600 mió kr. í amerikonsku fyritøkunum Pier 1 og the Pier. Hetta eru fyritøkur, sum selja búnýti av ymsum slag. Ognarluturin hjá Jákupi í felagnum er 9,9%.

Pier 1 varð stovnað í California í 1962, og rekur handilsketan í dag 1.200 handlar í USA, Canada, Mexico og í Stórabretlandi. Umsetningurin hjá fyritøkuni var í fjør knappar $ 2 mia.

**-mørk**

# Týdningarmikil gassboring sunnan fyri Føroyar



*Boripallurin Transocean Rather fer í næstum undir at bora Benbecula brunnin sunnan fyri Føroyar og eftir tað tríggjar brunnar á Rosebankøkinum eystanfyri fyri føroyska markið*

**Oljufeløg hava longu gjørt týðandi gassfund á Rockalløkinum sunnan fyri Føroyar. Í apríl fara Statoil, Shell og Exxon at gera enn eina boring, sum kann hava við sær útbygging við gassleiðing til Skotlands, ið aftur kann skunda undir útbyggingar millum Føroyar og Hetland**

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tað er ikki bert eystan fyri føroyska markið, at komandi oljubrunnar kunnu fáa stóran týdning fyri Føroyar sum framtíðar oljutjóð. Eisini sunnan fyri markið verður borað í summar, ein brunnur, sum óbeinleiðis kann fáa stóran týdning fyri framtíðar tilgongdina á føroyskum øki eisini.

Hetta kom m.a. fram á Oljuráðstevnuni ”Offshore 06” í Norðurlandahúsinum herfyri. Tað var leitistjórin hjá Statoil, Garreth Allinson, sum í framløgu síni og seinni í svari uppá fyrispurningar frá pressuni, greiddi frá eini sera týdningarmiklari boring vestan fyri Hebridurnar, í tí sokallaða Rockalløkinum. Her fara Statoil saman við tveimum av heimsins størstu oljufeløgum, Shell og Exxon, at bora ein metingar- og avmarkingarbrunn, nevndur Benbecula, longu í apríl.

Tað áhugaverda við hesum økinum er, at Shell longu hevur gjørt eitt stórt gassfund her. Men økið liggur langt til havs og langt frá nøkrum undirstøðukervi (infrastrukturi,blaðm.) Skal ein útbygging gerast, so er neyðugt at finna enn meira gass, og tað er hetta, sum Statoil saman við Shell og Exxon fer í gongd við at kanna um stutta tíð. Garreth Allinson upplýsti, at møguleikin at finna meira gass í hesum økinum verður mettur góður, hóast talan er um stóran váða eisini.

Um so er at boringin eydnast væl, so fara feløgini at umhugsa at byggja hetta gassøkið út og leggja rørleiðing til lands. Ein slík rørleiðing vil tá ganga framvið leiðunum vestan fyri Hetland og víðari inn á skotska meginlandið.

Ein gassleiðing av hesum slag kann fáa ómetaliga stóran týdning fyri framtíðar útbygging av øðrum smærri og størri gassfundum vestan fyri Hetland. Tá kann tað bráddliga løna seg at útbyggja fleiri smærri gassfund og binda framleiðsluna higani í komandi gassleiðingina frá Benbecula. Og tá føroyski landgrunnurin er í grannalagnum og møguleikar eisini eru at finna gass um okkara leiðir, so er ikki óhugsandi, at komandi borivirksemið vestan fyri Hebridurnar kann fáa týdning fyri okkum eisini í framtíðini.

Hetta er sjálvandi ein møguleiki, sum má takast við fyrivarni. Fyrsta fortreytin er tann, at tað eydnast Statoil at finna gass í summar. Alt eftir støddini á gassfundunum har kann ein útbyggingarætlan so gerast, sum fevnir um ta stóru gassleiðingina til Skotlands.

Garreth Allinsson viðgekk tí á oljufundinum í Norðurlandahúsinum, at umframt at tað standa spennandi boringar fyri framman á føroyska landgrunninum, og her fyrst og fremst Brugdan í summar, so eru brunnarnir, sum skulu borast ávikavist eystan fyri markið, Rosebank og síðani sunnan fyri markið, Benbecula eisini av stórum týdningi fyri eina framtíðar leiting og framleiðslu við Føroyar.

Statoil, sum er við í øllum hesum umrøddum brunnum, Brugdini, Rosebank og Benbecula fer at brúka góða milliard krónur til boring í hesum økjunum í ár.




*Stena Don, sum skal bora Brugduna í summar*